

*en, Hansa Bærentsen og Linda Nolsøe*



*Hilmar Heinesen er elsti brúkarin á Dagstovninum, og honum dámar serliga væl at veva*

kemur órógv í kortspælið, av tí at ein brúkari drálar ov leingi at geva út, so at hini ótolnast.

Skundisliga fer eitt starvsfólk til hjálpar. Tað fær kortspælið á glið aftur.

## Skriva lívssøgu

Serliga væl umtókt er sangurin. Fyri at gera tað áhugavert eisini fyri búfólkini á stovninum, fara tey á Dagstovninum á tær ymsu deildirnar at syngja fyri teimum.

Starvsfólkini greiða frá øðrum tiltaki, har tey skriva lívssøgur saman við brúkararnum á Dagstovninum.

- Saman við okkum siga tey eldru frá barndóminum, andaliga lívi teirra, um makar og børn og tílíkt, sum tilsamans er teirra lívssøga.

- Hetta er ein skipan, sum serliga er ætlað minnisveikum, men sum eisini hóskar væl til tey eldru. Tað kann verða hent hjá okkum og teimum, um tey seinni skulu flyta heimanífrá.

Starvsfólkini hava nógvar søgur at siga, eitt nú um tvær vinkonur frá barnaárunum í Nólsoy, sum hittust aftur á Dagstovninum. Tær kunnu sita og práta í tímavís, og njóta útsýnið úr Dagstovninum yvir á kendar gøtur og tosa um støð og hendingar í barnaárunum í heimbygdini.

- Vit búðu í hvør sínum enda á bygdini. Hvønn morgun fóru vit út at spæla og høvdu tað sera stuttligt, sigur onnur. Hin giftist og flutti út á bygd, men vinkonurnar varðveittu sambandið gjøgnum árini. Stór var gleðin tá tær báðar hittust á Dagstovninum

Endamálið við Dagstovninum er at stuðla tey eldru soleiðis, at tey sum longst kunnu varðveita sín førleika sálarliga og sosialt.

Mest umráðandi er tann sosiala samveran, men á stovninum verður eisini hildið eyga við, hvussu tey eldru eru fyri. Hugt verður eftir, um tey t.d. fáa heilivág, eitt nú fyri sukursjúku og blóðtrýst, at tað er rætta mongdin, ella um brillurnar hava rætta styrki, hoyritólini eru í lagi o.s.fr..

Leiðslan á Dagstovninum, økisleiðarin hjá Heimarøktini, leiðarin á Umlættingarheiminum og umboð fyri Vitjunartænastan í Tórshavnar Kommunu, hava fund hvønn mánað, har tosað verður um støðuna hjá, bíðilistan til Dagstovnin og døgurðamatin til heimabúgvandi pensionistar.

## Týðandi sosialt tilboð

- Vit skulu syrgja fyri at døgurðamaturin, sum verður koyrdur út til fólk í býnum, verður settur í køliskápið. Tað er ikki nóg mikið bert at seta døgurðan á trappuna ella inn í forstovuna.

- Í sjálvum sær er tað eisini ein trygd, at eitt fólk kemur á gátt hvønn dag, eisini fyri at vita, um alt er í lagi heima. Harnæst hava vit ein kontaktpersón, sum vit venda okkum til, um ikki alt er sum tað skal vera, sigur Marjun Smith, leiðari á Lágargarði.

- Skipanin við dagstovninum hevur primert fyribyrgjandi endamál at stimbra tey eldru, so tey kunnu verða heima sum longst. Tað hevur í stóran mun verið við til at útseta tørvin á stovnsplássum.

- Dagstovnurin er eitt týðandi sosialt tilboð, saman við øðrum møguleikum hjá teimum eldru at taka lut í handa- og andaligum tiltøkum. Hitt tilboðið, at veita heimabúgvandi føðslugóðan døgurðamat, hevur eisini stóran týdning fyri tann einstaka. Serliga av tí at eldri fólk sum búgva einsamøll heima, ofta ikki hava hug ella møguleikar at gera fjølbroyttan mat.

- Tey eldru siga tað sjálvi. Tað ger mun at fáa góðan kost. Nógv eldri fólk siga eisini, at heilsan er batnað, síðani tey komu við í døgurðaskipanina, sigur Marjun Smith.

Eftirspurningurin er stórur at sleppa á Dagstovnin á Lágargarði. Fyri at geva so nógvum sum gjørligt henda møguleika, verður tilboðið til tann einstaka sett eftir, hvønn tørv tey hava.

Seks starvsfólk arbeiða heila og hálva tíð á Dagstovninum.

## Eldratiltøk í Tórshavnar Kommunu

Røktar- og umlættingarheimið Lágargarður er sjálvsognarstovnur, fíggjaður av landinum og hevur pláss fyri 48 búfólkum.

Umframt tað bjóðar stovnurin heimabúgvandi avlamis- og fólkapensionistum dagtilhald, har brúkarar kunnu vera í dagtímunum frá mánadegi til fríggjadag. Endamálið við Dagstovninum, ið hesin partur av virkseminum kallast, er at lætta um hjá teimum eldru, sum búgva heima. Eitt nú við at varðveita og stuðla førleikan hjá einstaklinginum bæði sálarliga og sosialt.

Umframt dagstovnin bjóðar starvsfólkið á stovninum venjingar-tilboð við ergo- og fysioterapi.

Ergoterapeutar og fysioterapeutar veita einstaklingum og bólkum venjing. Hesar venjingar eru fyribyrgjandi- og víðlíkahaldsvenjingar, sum bøta um, fyri at brúkarin, bæði úti og heima, sum longst kann verða sjálvhjálpin í gerandisdegnum.

Ergoterapeutarnir kunnu bjóða venjing á staðnum og í heiminum, meðan fysioterapeutarnir bert arbeiða á Lágargarði. Bæði ergo- og fysioterapeutarnir kunnu eisisini veita vegleiðing og meta um tørv á hjálpartólum og tillagingum heima hjá brúkararunum

Á Dagstovninum er pláss fyri 61 fólkum, sum eru heimabúgvandi, umframt 42 búfólkum á stovninum. Treytin fyri at sleppa á Dagstovnin er, at brúkarin er sjálvhjálpin og førur fyri at luttaka í teimum tilboðum, sum dagstovnurin hevur at bjóða.

Brúkarin á Dagstovninum verða koyrd aftur og fram og kunnu keypa sær døgurða og ein drekkamunn, fyri eina sámuliga upphædd.

Annað tilboð á Lágargarði er, at heimabúgvandi pensionistar kunnu bíleggja sær døgurðamat, sum verður koyrdur til dyrnar. Umleið 150 fólk í Tórshavnar Kommunu brúka henda møgulleika.

Tórshavnar Kommuna rindar 450.000 krónur í stuðli til døgurðaskipanina.

Eins og bíðilisti er at sleppa á røktar- og umlættingarheimið Lágargarð, er eisini bíðilisti at sleppa á Dagstovnin og til venjingar hjá fysio- og ergoterapeutunum.

## Onnur eldratiltøk í Tórshavnar Kommunu:

Dagtilhald fyri minnisveik í Tjarnargarði og á stovninum hjá Alzheimerfelagnum.

Tilhaldið í Tórsgøtu, har 200 – 300 um vikuna pensionistar hittast.

Heimavitjunartænastan fer út til allar heimabúgvandi pensionistar yvir 75 ár, sum ikki fáa heimahjálp, greiðir m. a. frá ymsu tiltøkunum í kommununi.

Upplýsing um eldratiltøkini eru tøk á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommunu

Fíggjarætlanin fyri Dagstovnin á Lágargarði í ár er 1,582,00 krónur.



*Eitt serligt rúm er fyri teimum, sum hava tørv at fáa ein hvíld aftaná døgurða. Her er tað Sólrun Højsted, ítrivsvegleiðari, sum ballar tær báðar Honnu Bærentsen og Sonnu Poulsen*